# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit noyðast at ásanna, at Hugo Chavez hjálpir brotsmonnum at smugla reúsevni til Evropa*

*(amerikanskur løgregluovasti)*

# 40 ár síðani Thule-óhappið

**Amerikonsk skjøl vísa, at USA var til reiðar at rinda teimum, sum fingu skaða av óhappinum, endurgjald, men at danska stjórnin segði nei**

Í dag eru 40 ár, síðani eitt kjarnorkuvápnað amerikanskt B52-bumbuflogfar datt niður við Thule í Grønlandi, og fleiri kilo av plutonium vórðu spjadd um alt økið kring støðina. Í 1995 fingu teir sonevndu Thule-arbeiðsmenninir, sum ruddaðu økið eftir óhappið, 50.000 krónur í endurgjaldi í part frá táverandi stjórnini í Keypmannahavn.

Síðani hava politikararnir lagt lok á málið. Men teir Thule-arbeiðsmenninir, sum eru eftir á lívi, hava ikki slept málinum, og í gjár hittust nakrir teirra í Danmark. Har kom millum annað fram, at USA hevur alla tíðina verið til reiðar at rinda arbeiðsmonnunum endurgjald, men at Danmark hevur sagt nei. Skjøl, sum amerikanska sendistovan í Keypmannahavn fekk úr Washington longu í 1968, vísa, at USA var sinnað at rinda arbeiðsmonnunum upp í 15.000 dollarar í part í endurgjaldi, men danska stjórnin vísti ikki tilboðnum áhuga.



*Thule-arbeiðsmenninir fara nú til ES-dómstólin fyri at fáa fatur á loyniligum skjølum um Thule-óhappið*

*(Mynd: Polfoto)*

Skiftandi danskar stjórnir hava sýtt fyri at avdúka loynilig skjøl frá kalda krígnum, men Thule-arbeiðsmenninir hava nú lagt málið fyri ES-dómstólin við kravi um atgongd til tey loyniligu skjølini, ið viðvíkja Thule-óhappinum. Harafturat krevja menninir, at teir fáa eina heilsukanning um árið. Av teimum 1200 Thule-arbeiðsmonnunum eru nógvir deyðir at krabbameini. í dag eru umleið 200 eftir á lívi.

# Hann skal takast av døgum

**Hizbollah-leiðarin sigur, at rørslan hevur goymt leivdir av falnum ísraelskum hermonnum. Nú krevja ísraelsmenn, at Hassan Nasrallah verður fyribeindur**

-Okkum nýtist ikki at tingast við Hassan Nasrallah. Vit eiga at beina fyri honum, sigur ísraelski innanríkisráðharrin, Meir Shitreet, við blaðið Haaretz.

-Hann eigur ikki at sleppa at síggja dagsljós eina einastu ferð afturat, sigur ráðharrin í íbúðarmálum, Ze'ev Boim, við blaðið.

Teir báðir ráðharrarnir eru bara tveir av nógvum ísraelsmonnum, sum gjørdust frá sær sjálvum um vikuskiftið, tá Hizbollah-leiðarin háðaði ísraelska herin og segði, at Hizbollah hevur ymsar likamslutir av fleiri ísraelskum hermonnum, sum fullu í Suðurlibanon í krígnum á sumri í 2006.

Ísrael og Hizbollah hava avtalað at samráðast um tveir ísraelskar hermenn, sum hava verið fangar hjá Hizbollah síðani kríggið í 2006. Altjóða tíðindastovurnar halda, at Hizbollah roynir at leggja trýst á Ísrael undan samráðingunum við at kunngera, at rørslan eisini hevur goymt likamslutir av falnum hermonnum.



*Hassan Nasrallah hevur fingið øði í nógvar ísraelsmenn, sum hótta við at beina fyri honum*





# Rændi hann Madeleine McCann?

Jane Tanner hevur sagt, at hon sá ein mann við einum barni í Praia da Luz um kvøldið tann 3. mai í fjør. Nú hevur ein teknari hjá FBI teknað ein mann eftir tí, sum Jane Tanner hevur sagt um hann.

-Vit vilja hava at vita, um nakar kennir hann, og tí er tekningin almannakunngjørd, sigur talsmaðurin hjá McCann-hjúnunum, Clarence Mitchell.

## STUTT SAGT

### Putin ávarar Kosovo

Velur albanski meirilutin í Kosovo at loysa frá Serbia, skal hann ikki vænta sær nakran stuðul úr Ruslandi í framtíðini. Tað segði russiski forsetin, Vladimir Putin, tá hann var í Bulgaria og vitjaði í gjár. Á tíðindafundi vísti Putin á, at Serbia er ímóti, at Kosovo fær sjálvræði. Hann segði, at Russland og Serbia eru vinarlond, og at Russland fer ikki at ganga við til nakað, sum gongur ímóti viljanum hjá serbum. Hann eggjaði ístaðin altjóða samfelagnum til at taka samráðingarnar um Kosovo uppaftur, so ein friðarlig loysn kann finnast.

### Fuglakrím í Ukraina

Eftir boðum frá heilsumyndugleikunum eru umleið 25.000 høsnarungar avlívaðir í Ukraina, tí kanningar høvdu staðfest, at nakrir høsnarungar høvdu fingið fuglakrím av tí vandamikla slagnum H5N1. Samstundis hava myndugleikarnir byrgt eitt stórt øki av fyri at forða fyri, at sjúkan skal breiða seg, men enn er einki, sum bendir á, at sjúkan hevur breitt seg. Fuglakrímið H5N1 varð fyrstu ferð funnið í Ukraina í desembur í 2005.

### Bók um hópdráp í Póllandi

Ákæruvaldið í Póllandi umhugsar at stevna søgumanninum Jan T. Gross. Orsøkin er, at í einari nýggjari bók skrivar hann, hvussu póllendingar gjørdu seg inn á polskar jødar aftan á seinna heimsbardaga. Fyri sjey árum síðani elvdi sami høvundur eisini til øði í Póllandi, tí tá vildi hann vera við, at póllendingar høvdu beint fyri fleiri hundrað jødum í bygdini Jedwabne í 1941. Jan T. Gros, sum sjálvur er jødi av polskum uppruna, arbeiðir sum søgufrøðingur á lærda háskúlanum Princeton í USA.